# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Málið á hægri lærustovnum

Tveir lærdir menn, lærarar á hægri lærustovni, høvundar og hvør á sínum øki kendir sum idealistar, mæla til at lóggeva um, at málið á endurskipaða fróðskaparsetrinum skal vera føroyskt. Funnist verður at, at tað ikki í nóg stóran mun gongur fram av nýggja uppkotinum til lóg um Fróðskaparetur Føroya, at stovnurin skal fjálga um og menna føroyska málið. Henda støða verður tulkað sum, at tað eru fleiri, ið halda, at undirvísingarmálið á Setrinum skal vera føroyskt og einki annað. Hava vit uppruna Fróðskaparsetursins í huga, so skilja vit væl hesa støðu, og verða í framtíðini einans føroyskt mál og mentan høvuðsevni hjá allari gransking og undirvísing á stovninum, ber sjálvandi til at uppihalda hesa støðu.

Hinvegin hevur nógv verið talað um, at Fróðskaparestrið skal umskipast til eitt veruligt altjóða universitet. Hetta evnið var nógv frammi í valstríðnum og løgdu serstakliga Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin dent á hetta hugtak. Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin hildu seg ikki aftur. Hóast eingin av hesum flokkum í valstríðnum veruliga gjørdi greitt, hvat slag av stovni talan var um, so er nærliggjandi at hugsa sær, at talan var um eitt fróðskaparsetur, ið kann draga til sín lesandi og granskarar uttan úr heimi. Hetta skuldi sostatt gerast ein liður í svari okkara til altjóðagerðina.

Tað má kunna bera til at sameina bæði sjónarmið. Tað er sjálvsagt, at okkara lærdi háskúli, Fróðskaparsetrið, eisini í framtíðini verður høvuðsálitið í føroyskari málstevnu. Hinvegin virkar tað ikki skilagott við lóg at forða stovninum í at draga til sín útlendsk lesandi og útlendskar granskarar - at forða stovninum í at gerast ein altjóða stovnur. Tað tykist ikki skilagott at seta hesum útlendsku bólkum sum treyt at læra føroyskt fyri at sleppa at lesa og virka á Setrinum. Løgtingið eigur tí at finna eina loysn, ið tryggjar, at Setrið eisini í framtíðini er eitt álitið, tá tað ræður um gransking í føroyskum máli, bókmentum og mentan, samstundis, sum stovnurin verður endurnýggjaður og nútímansgjørdur og brynjaður til altjóðagerðina. Fróðskaparestrið er hóast alt bert ein partur av okkara málstevnu. Málstevna er ein heild, sum tað so væl er skjalprógvað í tí valaverki, sum Málstevnunevndin legði fram stutt fyri áramótið. Landsstýriskvinnan eigur tí sum skjótast at síggja til, at tilmælini hjá Málstevnunevndini verða sett í verk, so okkara móðurmál stendur styrkt og vælbrynjað at taka ímóti teimum mentanarligu og málsligu avbjóðingum, sum altjóðagerðin dagliga gevur okkum øllum føroyingum.

**Sosialurin**

## Tað fíggjarliga trygdarnetið og siðspillandi landskassafyrisiting

HERI MOHR



Í fjølmiðlunum er fráboðað, at Føroya landsstýri hevur í kvittanum at yvirtaka Fíggjareftirlitið, sum í dag er danskt málsøki.

Fíggjareftirlitið hevur eftirlit við øllum peningastovnum og umsitur *Indskydergarantifonden*, ið tryggjar innistøður í peningastovnum og øðrum, ið umsita privatan pening. Sjálvur grunnurin er privatur, sjálvveigandi stovnur.

Í lógini frá 1987 um nevnda grunn er m.a. tilsikilað:

”*Indskydergarantifonden dækker efter fradrag af indskyderens eventuelle forpligtelser over for det pågældende institut, indskud i instituttet indtil 250.000 kr. pr. indskyder*.

(Hetta er eftir øllum at døma seinni broytt til 300.000 krónur. HM)

*Indskud på indekskonti, kapitalpensionskonti, selvpensioneringskonti, ratepensionskonti, børneopsparingskonti, boligopsparingskontrakter, uddannelsesopsparingskonti, indskud, der står på advokaternes klientkonti, indskud, der forvaltes i godkendte forvaltningsafdelinger i henhold til lov om anbringelse og bestyrelse af umyndiges midler m.v. efter arvelovens § 61 og 65. samt indskud, der er deponeret i henhold til deponeringsloven, skal fonden dække fuldt ud*”.

Trygdargrunnurin virkar eftir av ES (EU) fastsettum reglum.

Verður Fíggjareftirlitið varugt við, at peningakervið í síni heild er komið í vanda, tekur staturin og Nationalbankin um endan. Seinast tað hendi var í 1992. Tá flýggjaðu – eins og í 1952 – ung í túsundatali yvir háls og herðar av landinum takkað verið tí ”vi-alene-vide” førda landspolitikki við privatum premissum.

Landskassatøming lá tá á døgum á hvørjari tungu, og nú er hon aftur komin á varrarnar, men saman við einum øðrum slag av kassatøming, sum við donskum orði verður kallað selskabstømning.

Hetta hevur alment verið ókent í Føroyum, og er tað kanska orsøkin til, at fyribrigdið ikki finnst á okkara máli? Men í Danmark kom tað fyri árum síðani í ólukkumáta í rampiljósið, og politikarar og ákæru- og dómsvaldið fingu úr at gera.

Um nú tað fer at henda, at tann føroyski fíggjarheimurin við løgtingslóg – ella rættari sagt við landsstýrisavgreiðslu – verður loystur úr tí danska Fíggjareftirlitinum og harvið eisini missir trygdarnetið í *Indskydergarantifonden*, so mugu okkara peningastovnar: Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Eik Banki, Føroya Banki og tryggingarfeløgini í góðari tíð fráboða kundunum, hvørja trygd hesir stovnar kunnu bjóða sínum kundum í staðin fyri trygdina frá *Indskydergarantifonden*.

Sum kundi í Eik Banka (fyrr Føroya Sparikassi) í 52 ár vil hann, ið hetta skrivar, vóna, at Eik Banki ger sína skyldu móti partaeigarunum og kundunum – og sum sagt í góðari tíð, tí nú leikar á.

**Gamalt var at gita gátur.**
Í samgonguskjalinum 2008 er semja um ”Ríkisveiting”:

*Málsøkið Serumsorgan verður yvirtikið. Kostnaðurin er 117 milliónir. Upphædd av ríkisveitingini verður árliga sett til viks til tess at røkka hesum máli.*

Hvør kann gita hasa gátuna?

Vegleiðandi upplýsingar: *Serumsorgan* finst ikki í løgtingsins fíggjarlógum. *117 milliónir er ikki kostnaðurin*. (Hetta eru kanska tær í blokkinum til Serforsorg oyramerktu milliónirnar, sum landsstýrið niðurfrysti 1. januar 2002.)

**Ein onnur gáta:**
Tann 1. januar 2002 niðurfrysti landsstýrið blokkin og skerdi við hesum fíggingina av heilsuverkinum, almennum pensiónum og serforsorginni.

Við hvørjari lógarheimild kann landsstýrið virka fyri, at ríkiskassans fígging av ikki-yvirtiknum málsøkjum verður lækkað ?

Okkara frægi rithøvundur Hanus Kamban spurdi í einum álvarsomum lesarabrævi, um menn eru óðir í høvdinum. Hesin spurningur hevur nú tikið seg upp, og hann verður ætlandi meira átrokandi, tá ið áttamannafarið í Tinganesi av álvara hevur lagt frá landi, og sálarliga, destruktiva moldvørpuarbeiði í London og Kjøpinhavn við nationalistiskari indoktrinering, ósannleika og spotttrekandi skemti av nýggjum fer at gera vart við seg.

Hanus er ikki einsamallur. Ein meiriluti av Føroya folki úti og heima seta sama spurning sum hann í lesarabrævinum: Eru teir, sum nú ráða fyri borgum, ”blivnir vindandi óðir í høvdinum?”

*Brain drain*, pengaflýggjan og pengamangul til heilsu-, skúla- og almannaverk kunnu gerast álvarslig hóttan í einum annars vælskipaðum samfelag.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.